TILTØK

FØÐINGAR

6. mars fingu Elisabeth Joensen-Næs og Nikkels Djurhuus, Keypmannahavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3840 gr.

13. mars fingu Anna-May og Tummas E. Djurhuus Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3050 gr.

14. mars fingu Arnhild Rubeksen og Regin G. Joensen, Odense, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3350 gr.

20. mars fingu Vanja Jacobsen og Andrias J. Vilhelmsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3450 gr.

21. mars fingu Diana og Einar Martin Hammer, Froðba, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4070 gr.

22. mars fingu Durita Hilduberg og Janus Poulsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4355 gr.

23. mars fingu Heidi Johannesen og Hannis Jacobsen, Vestmanna, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4000 gr.

24. mars fingu Helen Waag og Alén Viderø, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3860 gr.

24. mars fingu Jóna Hammer og Atli Ryggshamar, Kambsdalur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3250 gr.

25. mars fingu Jana Skoradal, Sandavágur og Jákup Henriksen, Miðvágur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3500 gr.

28. mars fingu Eyðvør T. og Steinbjørn Olsen, Argir, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3900 gr.

28. mars fingu Jacquelina Nielsen og Fríðrikur Bláhamar, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3600 gr.

29. mars fingu Joan Jacobsen og Regin Nielsen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4090 gr.

29. mars fingu Gudny av Húsabrúgv og Regin Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3825 gr.

30. mars fingu Dorrit Strøm og Herman Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3200 gr.

BRÚDLEYP

Í dag, 31. mars kl. 16 giftast í Havnar kirkju Beinta Leivsdóttir Andresen og Leon Smith. Veitsla verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.

Leygardagin 14. apríl kl. 15 giftast í Samkomuni Immanuel, Kristina Hansen, Funningsfjørður og Jákup Tausen, Tórshavn. Veitslan verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00. Tey,ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verðabiðin um at siga frá á tlf. 310273, 441207 ella 441265.

Leygardagin 21. apríl kl. 16.00 giftast í Bíggjar kirkju Gudny Heinesen, Bøur, og Erik Hansen, Miðvágur. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá áðrenn 9. apríl á tlf. 332803 ella 332702.

Leygardagin 5. mai kl. 15 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Poula E. Reinert Petersen, Saltnes og Hanus M. Olsen, Norðragøta. Brúðarveitsla verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá á tlf. 447845 ella 441401 áðrenn 22. apríl

Leygardagin 12. mai kl. 15 giftast í Tvøroyrar kirkju Mina Debes, Tvøroyri og Kaj Midjord, Akrar. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í veitslu,ið verður hildin á Hotel Øravík kl. 19.00, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 372173 ella 220723 innan 2. mai.

Gudstænastur
Boðanardagur Mariu
Rituvík: kl. 11, Meinhard Bjartalíð. (Talvan gongur fyri breyð til heimin)
Glyvrar: kl. 11 lestur. (Talvan gongur fyri breyð til heimin)
Gøta: kl. 12, børn luttaka, Kjartan Mørkøre
Sumba: kl. 12, konfirmatión, Erland Beder
Leirvík: kl. 11, altarg., Sverri Steinhólm
Hósvík: kl. 11, Martin R. Jacobsen
Bøur: kl. 12, Inga Poulsen Dam
Kvívík: kl. 17 føstuguds-tænasta: Sálmar við Vestmanna sangkóri
Broytt kirkjutíð: Í Kollafirði og Hósvík verður nú farið í kirkju kl. 11
Hvannasund: kl. 12, (útvarpað), Elsa Funding
Havnar kirkja: kl. 11, konfirmatión, Sonja Klein
Kaldbak: kl. 12, altarg., Bjarni Bæk
Eiði: kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 messa, Emil Olsen
Sørvágur: kl. 11, konfirmatión, David Johannesen
Vesturkirkjan: kl. 11, konfirmatión, Heri Joensen
Argir: kl. 11, konfirmatión, Bergur D. Joensen
Árnafjørður: kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
Funningsfjørður: kl. 19, *Elduvík:* kl. 20.15, Marjun Bæk
Hellur: kl 19, Jógvan Fríðriksson
Vestmanna: Uni Næs
Norðskála: kl. 17, altarg., Peter O. K. Olofson. Kirkjukaffi aftaná
Selatrað: kl. 12, Jógvan Fríðriksson
Sandur: kl. 12, altarg., Jákup Reinert Hansen
Christianskirkjan: kl. 11, Niels Pauli Danielsen
Sandvík: kl. 12, Ólavur Rasmussen
Fámjin: kl. 12, Petur M. Rasmussen

Mánadagin 2. apríl kl. 20
Fuglafjørður, ungdómsgudstænasta, Uni Næs, Magni Christiansen og ung úr Fuglafirði og Leirvík syngja.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar Skúla: Kl. 14.00 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18.00 møti við Bodil og Malberg Olsen. Øll eru vælkomin.

Rhema á Hálsi
Leygarkvøldið kl. 20 opið hús fyri ungdóm.
Broyting: Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli.
Øll eru vælkomin.

Meinigheitshúsið í Havn
Leygardagkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagskúli.
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Gunnar Reynslág, barnaansing verður Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.
Meinigheitslegan verður í Nesvík 20.-22. apríl. Tilmelding fer fram við at ringja á tlf. 220797, á tlf. 220989 ella í húsinum innan 16. apríl. Øll eru hjartaliga vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin 1. apríl kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Sverra Steinhólm presti. Evni: Útferðin úr Egyptalandi.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

4. grein skótar
Vit hittast mikukvøldið í KFUK eftir gudstænastuna.

Ebenezer
Sunnudagin: kl. 10.00 Minnismáltíð Harrans, kl. 12.00 sunnudagsskúli, kl. 18.00 evangeliskt møti og kl. 21.00 útimøti.
Mánakvøldið kl. 20: Bønarmøti.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11.00: Møti, Major Tjåland talar. Kl. 13.30: Sunnudagsskúli. Kl. 18.00: Møti, Inger Hansen.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin:
Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 17.00: Landsbøn. Í morgin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18.00 kvøldmøti v/ Ólavi Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Heimasíða okkara: www.koma.fo

Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
Øll møti eru fyribils avlýst vegna umvæling.

Filadelfia, Sundalagið
Í annaðkvøld kl. 18.00: Sangkvøld v/ Theodor Petersen í Eydnuni á Oyrabakka.

Missiónshúsið í Hvalvík
Sunnudagin: Sunnudagsskúli kl. 14.30. Møti kl. 18 við Agnar og Albin úr Vestmanna. Øll eru vælkomin.

Meinigheitshúsið á Skála
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 við luttøku av ungum Argjafólkum. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli og kl. 19.00 møti við Bárður og Leilu. Lovsangsbólkur luttekur. Aftan á verður hugnalig samvera í ungdómssalinum. Innsavning.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 19 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Hebron, Leirvík
Í kvøld kl. 20.00 og sunnudagin kl. 18.00 verða bíbliutímar um Seinna Timoteusarbræv. Øll eru hjartaliga vælkomin.

GULLBRÚDLEYP

Í dag, 31. mars, kunnu hjúnini Sigrid og Guðleiv Guðjónsson úr Klakdsvík, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Jørundargøtu 55 í Hoyvík.

ANDLÁT

22. mars
Poul Nikláji Jacobsen, ættaður av Glyvrum, búsitandi í Tórshavn, 73 ár.
Ludvík Hansen í Norðdepli, vanliga nevndur Luddi, 77 ár.
23. mars
Andrea Danielsen, Sumba, vanliga nevnd Andrea í Kollgarði, 96 ár.
24. mars
Andrea Samuelsen, fyrrverandi sjúkrasystur, vanliga nevnd Diddan í Horni, 84 ár.
28. mars
Tana Kallsoy, Eiði, 67 ár.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

"Blæsir tú á ein neista, flammar hann upp, men spýtur tú á hann, slóknar hann – og bæði tvey koma úr munni tínum"

Soleiðis stendur í Sikars bók kap.28.12. Um Ábraham hevði blást á neistan, sum lá og gløddi, tá ið hyrðar hansara og Lots byrjaðu at gerast ósamdir, hevði tað enda í øðiligum skeldarii og slagsmáli, ikki bara millum hirðarnar, tí eisini millum Ábraham og Lot hevði fíggindskapurin reist seg til ein veldugan eld, serstakliga tá ið Lot valdi sær tey grønastu jarðarstykkini. Men Ábraham livdi við Guði, sum ber vakra navnið Guð friðarins. Tí vildi hann fegin liva sum barn friðarins. So spýtti hann á neistan, so at hann ikki slapp at flamma upp og gerast eitt stórt bál. Hann tosaði síðan blíðliga við Lot, so at teir kundu skiljast í friði, tað er ólíka nógv betri enn at liva í ófriði, tí tá ið vit skiljast í friði, eru vit altíð tilreiðar at hjálpa hvør øðrum á neyðar degi. Tað fekk Lot eisini at sanna; tá ið hann seinni varð settur í fangahús, kom Ábraham við 318 monnum og fríaði hann.

Vit kenna øll málburðin at brúka munn, tá verður muðurin brúktur at blæsa neistan upp við illum, beiskum, ósonnum og sleygandi orðum. Mong menniskju hava ljótan munn. Men fær Jesus loyvið at ráða í hjartanum, lærir hann okkum at hava ein vakran munn og tosa satt, so at fólk kunnu fegnast um tað. Og tað er ólíka nógv betrið enn at brúka stór orð og altíð skulla hava seinasta orðið. Liv við Jesusi, so fær tú náði at blæsa á neistan tá ið tað er neyðugt og at spýta á hann tá ið tað er neyðugt.

John S. Myllhamar, trúboðari

TILTØK

Ørkin, Saltangará
Einki møti verður í »Hæddini« sunnudagin vegna felagsmøti saman við samkomuni Lívsins Orð. Møti verður kl. 17.00. Húsmøti verður í Saltangará týsdagin kl. 19.00 hjá Antony & Charles. Verið hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21: Opið hús við Tummas Jacobsen. Sunnudagin kl. 17: Møti við Jan Jacobsen. Barnamøti kl. 17. Tú ert vælkomin í Kelduna. http://www.keldan.fo

Soli Deo Gloria
Sunnudagin kl. 14: Sunnudagsskúli. Sunnudagin kl. 16.30: Alpha skeið (11-15 ár). Sunnukvøldið kl. 18: Møti, fríur vitnisburður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Onki møti um kvøldið vegna felagsmissiónsviku á Sandi.

Betel, Vágur
Sunnudagin: Kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskur fundur.
Mánakvøldið kl. 20 bønarfundur.
Ónskvøldið kl. 20: Uppbyggingarfundur.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Kl. 18: Møti v/ Kirstein og Noru. Innsavnan til húsið. Kórið venur leygarkvøldið kl. 19.00
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Aglow, Suðuroy
Møti verður leygarkvøldið kl. 20.00 í hølinum hjá Tvøroyrar Handverkarafelag. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 2. apríl:
kl. 09.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen.
kl. 10.15-12.00 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresu felagsskapin.
Kortspæl, telving og onnur spøl.
Tilmelding til sjónleikin á tlf. 316491.
Týsdagin 3. apríl:
kl. 10.30-12.00 Látur uttan orð. Hava tygum hug at flenna? Vivian Guðmundsson
Kl. 15.30 Vitjan úr Fuglafirði
Mikudagin 4. apríl:
kl. 10.00-13.00 Matgerð. Anne Grethe Harlou.
kl. 12.00 Páskadøgurði Gjaldast áðrenn 70,-
kl. 14.30 Framsýning á Snarskivuni, Bárður Jákupsson
Hósdagin 29. mars:
kl. 10.30-11.00 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 11 Eitur nakað land Week-end? Jóanes Nielsen. Tilm. mánadg. tlf. 316491
kl. 14-17 Telduprát á 1. hædd, Brandur Petersen
Fríggjadagin 6. apríl:
Opið hús.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Vágs Matmøðrafelag
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða leygardagin kl. 17.00-18.00, sunnudagin kl. 11.00-12.00 og mánakvøldið kl. 20.00-21.00.

Al-anon
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

Javni N. Finsensgøta 32
Skrivstovan er á Hoydalsveg 40, 3. hædd (ovast) Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl. 10-14 Fríggjadag kl. 13-16 Tlf. 314827 Fax 310557 e-mail: javni@post.olivant.fo

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur

60 ÁR

Eivind Thomsen, Á Mýrini 6, bjóðar til 60 ára føðingardagsveitslu 14. apríl kl. 19 í Pálsstovu, Mykinesgøta 7. Tey,ið vilja gleða meg við at koma, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 311478 ella 314107 áðrenn leygardagin 7. apríl.

90 ÁR

Mikudagin 4. apríl fyllir Simon David Kalsø, Klaksvík, 90 ár. Tey, ið vilja vitja Símun Dava, eru vælkomin millum kl. 14 og 18.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygard. 31. mars: Sverri Lamhauge, tlf. 448016
Sunnud. 01. apríl: Kári Rasmussen, tlf. 447010

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

Castle Stalker

Blómandi býurin

Skoti

FLOGFERÐ: Vágar - Aberdeen 12. apríl ••• Aberdeen - Vágar 16. apríl

Brentwood***
Fyri hvønn í dupultkamari Kr. 2650,-
Eyka fyri einakamar Kr. 900,-

Grampian ***
Fyri hvønn í dupultkamari Kr. 2650,-
Eyka fyri einakamar Onki

Patio Hotel****
Fyri hvønn í dupultkamari Kr. 2875,-
Eyka fyri einakamar Kr. 900,-

Copthorne****
Fyri hvønn í dupultkamari Kr. 2875,-
Eyka fyri einakamar Kr. 900,-

Skene House Rosemount
Fyri hvønn í 6 mans íbúð Kr. 2390,-
Fyri hvønn í 4 mans íbúð Kr. 2485,-

Ferðaavgjald, kr. 474,- kemur afturat prísunum

Fæst á øllum ferðaskrivstovum kring landið...

ATLANTIC AIRWAYS
Tel 34 10 10 - Fax 34 10 01
www.atlantic.fo